# Sosialurin

Nr. 191 • mikudagur • 4. oktober 2006 • 80. árgangur • Kr. 13,00


## AB er í Formula-deildini



Ítr 16-18



## Fyrsta ølin skonkt umborð á Smyrli

Síða 2



Samrøða við Hans Blix:

## Altjóða samstarv alneyðugt

Síða 11

Føroyaska Francis:

## Vil verða stjørna í Hollywood






# SÆR SVART ÚT

Boringin á Brugduleiðini nærkast endanum. Borað verður helst hesa vikuna afturat. Sosialurin veit frá keldum at siga, at borurin hevur hvørki rakt við olju ella gass, men enn er ov tíðliga at gera avgjørdar niðurstøður, tí víðari kanningar skulu gerast. Tær kunnu koma til eitt positivari úrslit. Tó hevur boring tøkniliga verið væleydnað

Síða 8


DR. JACOBSENSGØTA 18 · TÓRSHAVN · 31 66 10



MARIE JO

SIRI LINGERI

Hava tit minst til at goldið haldaragjaldið av Føroya besta blaði...!!!

Sosialurin
Tórsgøta 1 · tel 34 18 00
fax 34 18 01 · post@sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

PGO G-Max



kr. 19.800,-
við hjálmi og handskum

ØLL MC ÚTGERÐ
MC-sølan
Skemmingsgøta 23
Tel. 311 101 & 216 300 · Fax 313 763
www.mc-solan.fo

Auto



3-1-1-2-3-4

... tú fært tað munandi betri



við HTH-KØKUM

Køkstorgið
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
tel 35 93 00 · fax 35 93 01

# Enn eingin olja

**Boringin á Brugduleiðini nærkast endanum. Borað verður helst hesa vikuna aftrat. Sosialurin veit frá keldum at siga, at borurin hevur hvørki rakt við olju ella gass, men enn er ov tíðliga at gera avgjørdar niðurstøður, tí víðari kanningar skulu gerast. Tær kunnu koma til eitt positivari úrslit. Tó hevur boringin verið ein tøknilig succes**

BRUGDUBORINGIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Borurin umborð á Stena Don melur framvegis – men neyvan longur enn vikuna út*

*Mynd: Jan Müller*

Alt Føroya fólk og stórur partur av oljuheiminum við munnu bíða spenningi í hesum døgum at frætta meira frá boringini á landgrunninum. Tað eru nú góðir tveir mánaðir síðani, at borurin hjá Stena Don varð settur í undirgrundina. Nógvar hava gitingarnar verið, og herfyri skrivaði norskt blað, at borurin hevði rakt við olju.

Sosialurin veit frá álítlandi keldum at siga, at enn hevur Stena Don hvørki rakt við olju ella gass. Boringin er um at vera liðug. Borað verður eftir øllum at døma vikuna út. Statoil, sum er fyristøðufelag, vil als einki siga um úrslitið higartil, og sama er galdandi fyri Jarðfeingi, men kortini hevur tað eydnast blaðnum at fáa upplýsingar um boringina.

Líta vit eitt sindur aftur um bak, so gekk tað sera væl at bora gjøgnum basaltið, og hetta í sær sjálvum er ein stórur sigur fyri leitingina um okkara leiðir, hetta er nakað, sum kann koma væl við, tá framtíðar brunnar skulu borast á landgrunninum. Fyri BP og ENI, sum skulu bora í 2007 og 2008, og fyri Chevron, sum helst skal bora í 2008 ella 2009, eru hesi tíðindi sera kærkomin. Tað fer at minka um kostnaðin.

Síðani borað varð gjøgnum tjúkku basaltfláirnar, sum eftir øllum at døma vóru væl tjúkri enn mett frammanundan, hevur spenningurin verið ómetaliga stórur hjá teimum 8 oljufeløgunum, sum eru partur av boringini.

Eitt skifti mettu keldur hjá blaðnum, at tað sá sera áhugavert út undir basaltinum, tí jarðfrøðiligu viðurskiftini vóru rættiliga meinlík metingunum hjá jarðfrøðingunum hjá Statoil. Síðani er borurin tikin uppaftur fleiri ferðir, og herfyri varð ein steðgur uppá fleiri dagar við boringini, tá loggað varð í brunninum, tvs. serstakar kanningar vórðu gjørdar við ymsari framkomnari útgerð djúpt niðri í sjálvum holinum fyri at tulka bæði grótsløg og jarðfrøðina.

Eftir hetta er boringin so tikin uppaftur og verður borað framvegis. Sum skilst á keldum okkara er ikki troffið við hvørki olju ella gass, men víðari kanningar skulu greina hetta nærri. Tí fyri at fáa eitt neyvt úrslit er neyðugt at gera fleiri kanningar aftrat, eisini eftir at boringin er liðug. Tað er heldur ikki óvanligt, at kanningarnar, sum verða gjørdar av tilfari og upplýsingum eftir eina boring, kunnu vísa kolvetni, hóast hetta ikki kundi staðfestast í sjálvari tí fysisku boringini.



*Herfyri vitjaði landsstýrismaðurin í oljumálum umborð á Stena Don*

*Mynd: Jan Müller.*

Hetta er eisini tað, sum er vanligt fyri nógvar aðrar brunnar, sum verða boraðir. Enn er so kortini eisini ein vón um, at okkurt skal henda teir seinastu metrarnar niður í undirgrundina. Og enn er sum skilst eisini ov tíðliga til at gera endaligar niðurstøður um, antin kolvetni er til steðar ella ikki, tí víðari kanningar kunnu koma til annað og harvið eisini meira positivt úrslit.

Samanumtikið er tíð ov tíðliga at koldøma eina boring sum hesa sum turra og miseydnaða. Tøkniliga sæð er hon longu ein succes. Og vitanin frá hesi boring kann so aftur verða hent hjá teimum, sum seinni fara at bora á landgrunninum.

# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Brugdan

Skulu vit ganga eftir tíðindunum, sum Sosialurin hevur frá keldum í oljuheiminum, so er tað so sum so við Brugduboringini á landgrunninum. Taka vit pulsin beint nú, so sær svart út.

Eitt skifti var sera góður hýrur umborð á Stena Don, á Jarðfeingi og á landsstýrismanninum í oljumálum, tí tað gekk sum smurt at bora gjøgnum basalt. Tað varð nettupp eitt av stóru ivamálunum, áðrenn farið varð undir hesa fyrstu boring á basaltinum á føroyska landgrunninum nakrantíð.

Eisini varð góður hýrur, tá komið varð gjøgnum basaltið, hóast tað var tjúkri enn hildið, tí jarðfrøðiligu viðurskiftini tyktust at sampakka við metingarnar hjá jarðfrøðingunum.

Síðani hevur valdað tøgn. Tað er væl skiljandi, tí hetta er ein brunnur, sum kemur undir tagnaðarskyldu, í hvussu er til boringin er liðug. Men ilt er at halda øllum upplýsingum aftur, tá talan er um kanska fleiri hundrað fólk, sum fylgja við og fáa upplýsingar um boringina sohvørt.

Og tað Sosialurin hevur fingið ”uppsnúsað” frá góðum keldum er, at enn er ikki troffið við hvørki olju ella gass. Men samtíðis er greitt, at boringin er ikki heilt liðug enn. Tí eru framvegis vónir, og verða heldur eingi sjónlig tekin til kolvetni seinastu metrarnar, so eru kortini ikki allar súðir syftar, tí tað er ikki óvanligt, at hátøkniligar kanningar aftaná boring avdúka olju og gass.

Hvussu hetta enn endar, so hevur boringin longu verið gagnlig fyri oljuleitingina við Føroyar, tí staðfest er, at tað er ikki nakar trupulleiki at bora gjøgnum basalt. Hetta er so nakað, sum kann koma øðrum oljufeløgum, sum fara at bora her, til góða.

Tað vil sjálvandi vera eitt stórt bakkast fyri oljuleitingina við Føroyar, um eingi tekin eru til olju ella gass undir basaltinum. Men vit eiga ikki at fella í fátt, tí hetta er so bara ein av fleiri brunnum, sum skulu borast næstu árini. Tað er tó óheppið fyri bæði 2. útbjóðing og komandi 3. útbjóðing á landgrunninum. Ein turr Brugda kann gera, at feløgini, sum fingu loyvi í 2. rundu, fara at vera sera varin við at binda seg til at bora, og fyri 3. rundu kann tað gera, at áhugin fyri henni rætt og slætt verður minni ella kanska eingin.

Nú mugu vit so bara síggja veruleikan í eyguni, men kortini eisini vera realistisk og tað merkir eisini, at vit gera okkum greitt, at hvørki á norska landgrunninum ella økinum vestan fyri Hetland var olja funnin eftir ”bara” fimm brunnar. Har var talan um ávikavist góðar 30 og 70 brunnar, áðrenn rakt við við lønandi oljukeldur. Tað kann vera ein uggi.

**Sosialurin**

## Samkyndar GRENJUSURRUR

**PETUR HERMANSEN**



Skilji ikki, hví tit samkyndu ikki kunnu verða tað tit eru og lata verða við at GRENJA. Tit hava tað útmerkað í Føroyum, ókey, úrvalið er ikki stórt, og er tað tann einasa grundin at farið verður av landinum til størri jagtmarkir.

Tit samkyndu gremja tykkum um happing og forfylging, lat meg fortelja tykkum, hvat tað er fyri nakað.

Líka frá fyrsta klassa og til børn vóru um 16 ár minnist eg til happing og forfylging, og hetta í ringasta aldri, tað vóru tey sum vóru FEIT, REYÐHÆRD, STERKAR BRILLUR, FRØKNUR, EITT DEFEKT BEIN og nógv annað. Hesi upplivdu HAPPING OG FORFYLGING.

Tá tit einaferð koma út úr skápinum, sum tað eitur, eru tit væl eldri enn hesi sárbaru børnini og eru fult før fyri at forsvara tykkum.

Sjálvur varð eg illa happaður, bæði av lærarum og børninum, og av læraranum settur aftast, tí eg ikki sá talvuna, og tey sum høvdu góð eygu, og rætta eftirnavnið sótu fremst.

Hvat við teimum minni mentu, og teimum handikappaðu?? Tey hava Gud hjálpi mær onga SER-LÓG og so grenja tey heldur ikki. Eg haldi, at tit gera tykkum til skammar, tykkum feila einki mær vitandi, ella???

Í Havnini hava altíð verið samkynd, alt sum eg veit um, hesi hava ongantíð verið verri fyri enn øll onnur, munurin var at tey passaðu seg sjálv.

Komi at hugsa um Benny og Róland, sála, verðins fittastu fólk, sum øll vóru góð við, og ongantíð hoyrdi tú teir grenja um nakað sum helst

Nei, eg haldi, at tit hava tað sum tit sjálvi ynskja tað. Eg havi kent nógv samkynd, og ongantíð havt trupulleikar av tí, sjálvt um eg als ikki eri samdur við tykkum.

Heldigvís eru vit nógv flest sum hava valt at fylgja natúruni, sum er Hann og Hon, sum so verða ein familja við avkomi, hetta er natúrligt.

So spyr sjálvandi ein samkyndur, hvat er natúrligt??

Tað er natúrligt, at um 30 samkyndir menn 30 ára gamlir fara út á eina oyggj, og tú vitjar teir aftur 30 ár seinri, so eru bert 15 eftir, fert tú so útaftur 30 ár seinri, eru kanska 2 eftir, aftan á 5 ár er ongin aftir, HETTA ER NATÚRAN

Eg vóni ikki, at Løgtingið ger nakað við hesi tápuligu krøv, sum samkynd seta, tí tað eru nógvir arðir bólkar av borgarum sum treingja til SERSØMDIR, men sum ongar fáa.

So mín áheitan á tykkum er, verið tað tit eru og lat samkomur, kirkjur og tey trúgvandi fáa frið og loyvi at hava sínar meiningar, líka so væl sum tit hava tykkara.

## Gomul ráð

**ÓLI MIKKELSEN**
lækni



25 ár eru farin, síðan Niels Bentsen var ríkisumboðsmaður. Hann hevði arbeitt við sjúkrahúsmálum, áðrenn hann kom til Føroyar.

Hann møtti hugagóður á sjúkrahúsfundum hjá sjúkrahúsunum og segði sína hugsan. Millum annað segði hann:

Tað er bíligari og betri at útbyggja Landssjúkrahúsið enn at senda nógvar sjúklingar av landinum.

Niels Bentsen varð hildin fyri gjøldur.

Hetta var ov »stuttligt« fyri Niels Bentsen, so hann sendi annan mann fyri seg á stýrisfundir. Nøkur ár seinni høvdu vit vitjan av umboðum fyri Danska Heilsustýrið. Viðvíkjandi sjúkrahúsunum vóru boðini greið:

Nýtímansgerið Landssjúkrahúsið, tí tað er høpisleyst at seta serdeildir á trý sjúkrahús til gott 40.000 fólk.

Teirra ráð vórðu eisini sligin upp í glens.

Hvat er hent?

Kostnaðurin av at senda sjúklingar av landinum økist í stórum. – At hækka játtanina til hesa konto tykist ikki at geva politikarunum stórvegis høvuðbrýggj. – Bíligari verður tað neyvan, um vit fara at senda sjúklingar í allar ættir.

Sjálvandi skulu vit hava eyguni eftir, hvat hendir rundan um okkum.

Grannalondini arbeiða móti at fáa færri, men størri og betri sjúkrahúseindir.

Vit áttu at verið væl fyri, tá vit eiga meir enn 80 útbúnar læknar í Danmark og aðrastaðni. Nógvir hava verið her sum yngri læknar og følt seg fyri. Hví koma teir ikki heimaftur?

Er føroyska sjúkrahúsverkið so ótíðarhóskandi, at tað ikki gevur læknunum hóskandi avbjóðingar?

Eru gomul ráð góð? Er ikki vert at skeita aftur til ráðini frá Niels Bentsen og danska Heilsustýrinum? Sjúkrahúsverkið hjá okkum má ikki dragna so nógv í mun til onnur, at tað ikki rættast upp aftur.

Her kevst broyttur hugburður.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

# Hans Blix: Meira altjóða samstarv er alneyðugt

**Allur heimurin bíðaði í spenningi eftir hansara niðurstøðu fyri góðum trimum. tá Kofi Annan hevði heitt á hann um at standa á odda fyri einum vápnaeftirlitsliði í Irak. Sosialurin hitti svian, Hans Blix, tá hann saman við Bill Clinton, fyrrverandi forseta í USA, helt fyrilestur í Frederikshavn í Norðurjyllandi fríggjadagin**



Vit skulu læra at liva saman, tí má heimssamfelagið mennast

Mynd: Bogi Eliasen



Mohamed El Baradei aðalstjóri í IAEA, Colin Powell, fyrrv. uttanríkisráðharri í USA og Hans Blix

SAMRØÐA
*Bogi Eliasen*



Nú siti eg her við hesum mætamanninum. Allur heimurin bíðadi eftir hansara niðurstøðu fyri góðum trimum árum síðan, tá Kofi Annan hevði heitt á hann um at standa á odda fyri einum vápnaeftirlitsliðið í Irak. Uppgávan var at kanna um grundarlag var fyri eini ST stuðlaðari innrás í Irak

## Royndur maður

Hans Blix er ein persónur, sum hevur roynt nógv. Hann hevur verið embætismaður á høgum stigi í Svøríki, verið Uttanríkismálaráðharri, arbeitt fyri Svøríki í ST og ikki minst verið aðalstjóri í altjóða kjarnorkufelagsskapinum IAEA. Hann var pensioneraður, tá Kofi Annan heitti á hann um at standa á odda fyri leitanini eftir hópoyðingarvápnum í Irak, til tess at meta um veruligt grundarlag var fyri at fara í kríggj.

## Talaði USA ímóti

Sum flestu kunnugt so metti hann, við støði í arbeiðnum, ikki at grundarlag var fyri eini innrás. Tað vóru ikki boðini krígsvongurin í USA ynskti. Blix royndi at vísa á, at brúk var fyri at kanna meira, heldur enn bert at leypa á og í kríggj. Men tað endaði við at USA við sameindum fór í kríggj, men uttanum ST.

Hans Blix leggur ikki fingrarnar ímillum, tá hann metir um leiklutin hjá USA og dylur heldur ikki fyri, at kríggið var og er eitt stórt mistak, serliga tí tað ikki bygdi á rættar upplýsingar og var uttanfyri ST leistin.

## Hóttanir og samstarv

Hans Blix leggur stóran dent á, at tað er av alstórum týdningi at altjóða samstarv verður raðfest. Hóast altjóða kjarnorkustovnurin IAEA ikki klárar at loysa alt, so hevur stovnurin havt stóra ávirkan á kjarnorkuøkið og samstarvið á økinum. M.a. við at tálma framleiðslu av kjarnorkuvápnum, at hava eftirlit við at kjarnorka verður rætt brúkt og at hava vitanarspjaðing á økinum.

## Stríðið um orku.

Blix er av tí fatan, at bæði Flógvakrígginikomu orsakað av áhuganum fyri olju. Ikki bara, men eisini. Ein stórur partur av tí ójavnvág sum er í heiminum, er m.a. tí at tað er ikki nóg stórt útboð av orku í mun til eftirspurningin, og tað elvir til spentar støður. Hann metir, at einasta rætta loysnin er at leggja størri dent á kjarnorku. "Fyrr var størsti trupulleikin kjarnorkuburturkastið, tað er ikki ein trupulleiki longur, um mannagongdirnar verða fylgdar". Kjarnorka kann loysa ein stóran part av orkutrupulleikunum. Tað krevur sjálvandi at trygdin verður hildin, og har hevur USA m. a. hugsað um ein leist til lond, sum ikki hava neyðugu førleikarnar, um at hjálpa teim, so tryggjast kann at eingin dálking verður, ella soleiðis at londini, sum kunnu framleiða trygga kjarnorku gera tað, meðan restin av heiminum so má býta oljuna sínámillum.

## Betra altjóða samstarvið

Men hann vísir eisini á, at vit hava tørv á víðkaðum altjóða samstarvi, sum hevur annað fokus enn bert londini sjálvi. Tað verður enn arbeitt ov nógv bert fyri seg sjálvan og ikki fyri heimin, heldur Blix. Hann vísir á, at vit hava økt altjóða samstarv, m. a. orsakað av tøkniligu framgongdini og tað ger, at heimurin verður noyddur at samstarva meira. Og tá man er meira saman, er neyðugt at hava reglur fyri hesum.

Og júst hvussu hetta skal gerast, eru lond og fólk ikki samd um. Tey flestu eru samd um, at altjóða skipanin hevur eitt demokratiskt undirskot upp á fleiri mátar. T.d. hava Kina og India meira enn eina milliard íbúgvar hvør, men bert tvær atkvøður í ST. Fleiri altjóða stovnar eru byrjaðir at vekta ávirkanina hjá limunum eftir støðd ella hvussu stóran part tey fíggja, og her fara vit helst at síggja royndir at finna ein frymil komandi árini, heldur Hans Blix.

## Hópoyðingarvápn

Blix hevur hesi seinasti trý árini staðið á odda fyri The Weapon of Mass Destruction Commission, ein óheft nevnd, fíggjað av svensku stjórnini, sum arbeiðir við at meta um hóttanina hópoyðingarvápn elva til. Hann vísir staðiliga á, at størsti vandin í dag er ein byrjandi vápnadupping. Vápnini, sum skuldu burturbeinast aftan á Kalda Kríggið, standa í stóran mun enn og vit síggja fleiri tekin um menning í vápnaskipanum, heldur enn avtøku av skipanum. Hetta er ein verulig hóttan, sum bæði er lívshættislig og negativt brúk av stórum peninganøgdum. Hann vísir á, at vandin við hópoyðingarvápnum, sum var á breddanum í Kalda Krígnum, enn er til staðar. Eini 1000 kjarnorkumissilar standa enn klárir til at hópoyða, um ein orrusta kemur í. Hetta er sambært Blix ein størri hóttan enn yvirgangur.

## Yvirgang og niðurgerð

Júst hvør orsøkin er til yvirgang, vil Blix ikki siga, men hann ivast lítið í, at niðurgerð er ein av høvuðsorsøkunum. Tað er eisini tí hann metir tað verða so avgerðandi neyðugt, at tað er ST og ikki Nato ella ein samgonga av londum, sum standa á odda fyri innrásum í lond.

## Nato

Blix er nógv umbiðin maður og ein av hansara støðum, sum ikki allir politikkarar í vestanlondum vilja vita um, er hansarar kritikkur av Nato víðkanini.

Eitt er, at tað kann verða torført at fáa lond upp í, sum ikki hava sama støðið at koma í samstarvið við, men hitt er hvat tað ger við sjálva valdsjavnvágina. Tá Sovjet fór í søguna, játtaði Rusland at londini í fyrrverðandi eysturblokkinum skuldu fáa frið. Úrslitið er, at tey verða tikin upp í vesturblokkin í staðin. Tey eru ikki "uttanveltaði". Tí siga m.a. nationalistar í Ruslandi, at tað er høpisleyst at sleppa endanum, tí londini fara bara undir amerikanskt vald, um tað ikki er tað russiska, sum t.d sæst við Ungarn, Pólandi og Slovakia. Nú er ikki talan um, at nøkur lond liggja ímillum Rusland og Nato, men at Nato hevur mark við Rusland. Blix vísir á, at Gorbatjov veruliga var visionerur, men at heimurin ikki hevur tikið av teim møguleikum, sum vóru aftan á Kalda Kríggið at fáa eina friðarliga javnvág, m.a. við at ST og ikki Nato skuldi styrkjast.

Blix vísir á, at vit síggja Nato-limirnir, og serliga USA, hava lyndi til at gera Nato til heimsins løgreglu. Tað riggar ikki. Í heiminum síggja lond Nato sum ein arm hjá USA. M.a. Libanon vísti greitt á, at tað er í lagið at ST kemur inn, men ikki Nato.

## Hevur greiðar støður

Hann tordi at tala Bush stjórnini beint ímóti, og í dag hevur søgan víst, at hann hevði rætt, og tað var provokatión at brúka Nato soleiðis. Hann metir eisini, at stríðið um orku er ein av stóru heimstrupuleikunum, sum partvís kann loysast við kjarnorku. Sum hann sigur, "vindur og onnur alternatív orka kann geva nakað, og effektivisering av orkubrúki nógv. Men tað er í dag bara kjarnorka, sum kann loysa orkutrupulleikan. Tað ger bæði at fátæk økir og lond fáa orku at menna seg, men eisini, at minni dentur verður lagdur á at sita á orkuni, sum part av politiskum valdi. Sum fyrrverandi aðalstjóri í altjóða kjarnorkustovninum IAEA, veit hann hvat tað snýr seg um.

Hans Blix er ein maður við royndum og tað merkist eisini tá vit báður sita í matstovuni á gistingarhúsinum og práta. Hann er umhugsin og byggir sínar metingar á royndir í svenskari uttanríkistænastu, altjóða stovnum og ikki minst sum akademiskur rithøvundi. Hann hevur skrivað fleir bøkur um altjóða rætt.

## FAKTA

### Hans Blix

Føddur í 1928 í Uppsala í Svøríki
Lisið løgfrøði í Uppsala, University of Colombia og Cambrigde (Phd)

| | |
|---|---|
| 1959 | Doktari í løgfrøði á Universitetinum í Stokholm. |
| 1963-76, | ráðgevi í altjóða rætti, Svenska Uttanríkismálaraðið |
| 1976-78 | Varastjóri í Uttanríkisráðnum |
| !978-79 | Uttanríkisráðharri |
| 1961-81 | Limur í svensku sendinevndini til ST aðalfundin |
| 1962-78 | Limur í svensku sendinevndini til Ráðstevnuna um Avvápnan í Geneve |
| 1981-97 | Aðalstjóri í IAEA |
| 2000-2003 | Formaður í UNMOVIC, ST vápnaeftirlitsliðnum í Irak |
| 2003- | Formaður í The Weapons of Mass Destruction Commission |